Prixið er í ár skipað við fýra innleiðandi kappingum, har tveir bólkar koma víðari til eina hálvfinalu. Frá hálvfinaluni verða tríggir bólkar valdir til finaluna í Prixnum, sum verður partur av nýggja tiltakinum, Atlantic Music Event. Øll tey innleiðandi umførini verða í Fuglafirði, hálvfinalan verður á Tvøroyri og finalan í Norðurlandahúsinum í Havn.

**1. umfar, 4. feb. kl. 20.00**
Go Go Blues · Paradox
Dimmi · SIC · DejaVu
Lama Sea

**2. umfar, 12. februar**
Ph 5,5. · Side Effect
All that Rain · Makrel
Róp · MMM

**3. umfar, 26. februar**
Eyðun Nolsøe · Lawetz
ROK · Direct Level
Frostbit · The Dreams

**4. umfar, 5. mars**
Braquet
Kristleif Zachariasen
Synarchy · EGR2PLZ
Terji Rasmussen Band
onkikanndiskuterast.altkann

**Hálvfinala, 2. apríl**
Í hálvfinaluni verða tveir teir bestu bólkarnir frá hvørjum innleiðandi umfari. Burtur úr teimum átta bólkunum, skulu tríggir teir bestu veljast til finaluna.

**Finala, 23. apríl**
Finalan í Prixnum verður partur av galla-tiltakinum, sum verður kallað Atlantic Music Event. Tríggir bólkar kappast um endaliga sigurin í Prixnum. Umframt finaluna verða aðrar tónleikaframførslur eisini.

**Nýggir sangir**
Í øllum teimum innleiðandi umførunum verður spælitíðin í mesta lagi 20 minuttir og í minsta lagi 15 minuttir. Tveir triðingar av spælitíðini skulu bólkarnir spæla sangir, sum ikki eru givnir út áður.

**Ferðsamband**
Bussar koyra í sambandi við øll tey innleiðandi umførini í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Bussar koyra úr Vestmanna, Sundalagnum, Eiði, Toftum, Strondum og úr Havn. Harafturat siglir strandfaraskipið Sam úr Fuglafirði til Klaksvíkar eftir tær innleiðandi kappingarnar, um nóg stórur áhugi er fyri hesum Serlig atgongumerki til Prixið og ferðaseðil til Sam fáast á Kunningarstovuni í Klaksvík.
Á heimasíðuni hjá Prix Føroyum - www.prix.fo - eru fleiri upplýsingar um ferðasambandið.

# ÚF FYRI FULLUM SEGLUM

**Útvarp Føroya ætlar at gera nógv burturúr Prix Føroyar kappingunum. Sent verður beinleiðis frá øllum umførum og sum nakað nýtt verður alnetið eisini tikið í nýtslu, har t.d. myndir frá umførunum verða at síggja. - Vit arbeiða við fullari orku og kunnu illa gera meira burturúr, sigur Ove Olsen, tónleikaleiðari í ÚF**

PRIX FØROYAR
*Dagfinn Olsen,*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Útvarpið sendir vanliga beinleiðis frá prixkappingunum. Soleiðis verður eisini hesaferð. Ove Olsen frá ÚF sigur, at teir fara at senda sum vanligt er frá prixkappingunum. Stórvegis broytingar eru ikki í mun til undanfarin ár.

- Tað eru eini 5 - 6 fólk til arbeiðis og vit koyra við fullari orku og fáa illa gjørt meira burturúr, enn vit gera, sigur Ove Olsen.

Tað eru 3 vertir, Rúni Jákupsson, Bjarni Mohr og Kári Sólstein. Tveir sita og fylgja við og fáa fólk inn til eitt prát, meðan ein fregnast í salinum millum áhoyrarar.



**Rúni Jákupsson og Bjarni Mohr fara saman við Kára Sólstein at standa fyri sendingunum hjá Útvarpinum frá Prix Føroyum.**
**Mynd: Jens Kristian Vang**

## Netið og Svf

Ove sigur, at sent verður Live frá øllum undanumførunum í Fuglafirði, men eisini semifinalan í Trongisvági verður live og eisini stóra gallakvøldið, finalan.

Nakað nýtt er tó, at alnetið eisini verður tikið í nýtslu. Útvarpsmannigin fer, sum prixkvøldini ganga, at leggja myndir út á alnetið, so fylgjast kann við á tann hátt eisini.

Meðan ÚF hevur full segl í samband við prixkappingina, so letur til, at Svf hevur valt annan leist, eftir tí vit hava frætt. Svf hevur vanliga gjørt sending frá ymsu kvøldunum, sum tó er komin nakrar dagar aftaná tiltøkini. Sum skilst, so verður hetta ikki í ár, men heldur verður ymiskt prixtilfar í øðrum sendingum, t.d. Mentanartíðindunum.

Hetta skal tó takast við fyrivarni, tí tað eydnaðist okkum ikki at fáa tíðindini staðfest, innan evsatmark.

# GULLI Í NÝGGJUM BÚNA

**Gulli Johansen hevur fleiri ferðir gjørt vart við seg við hørðum rocktónleiki og serligari útsjónd. Hann roynir seg aftur í Prixnum hesaferð, men nú í einari duett saman við gøtukvinnu**

DIMMI
*Eyðun Klakstein,*
*eydun@sosialurin.fo*


**Hetta var Gulli, tá ið hann fyri tveimum árum síðani var við í Prix Føroyum. Hesaferð verður einki ugh ugh.**
**Mynd: Jens Kristian Vang**

Hann verður ikki indiánari hesaferð, og tónleikurin verður ikki so harður, sum hann onkuntíð plagdi at vera.

Gulli Johansen er við í Prix Føroyum aftur hesaferð, men hann er farin frá at vera solistur til at vera partur av eini duett saman við einari gøtukvinnu – Malan Tyril.

Tey hava arbeitt saman um tónleik í eitt umleið eitt hálvt ár, og tað, sum varð reinur techno-tónleikur, er nú blivin ein meldur av øllum møguligum tónleikastílum.

– Prix Føroyar verður fyrsta framførsla hjá bólkinum, tó Gulli hevur havt sínar royndir fyrr á palli, sum indianara og ymiskt annað, so verður ikki sovorið á skránni hesa ferð. Dimmi hevur ikki nakað við tað at gera, siga tey bæði í bólkinum.

## Elektroniskur tónleikur

Tá ið Gulli Johansen fyri tveimum árum síðani var við til Prix Føroyar var tað við lutvíst forritaðum tónleiki, sangi og gittarspæli. Hann hevði gjørt alt einsamallur og var eisini einsamallur á pallinum til framførsluni.

Aftur hesaferð er tónleikurin fyri ein part elektroniskur, og Gulli hevur aftur staðið fyri at forritað, hóast tey bæði í bólkinum í felag arbeiða við tónleikinum.